# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Gunnleivur heldur fram sum formaður



Leygardagin var aðalfundur í Starvsmannafelagnum. Spenningur var um formansvalið, tí Heini Joensen stillaði upp ímóti sitandi formanni, Gunnleivi Dalsgarð.

Tað eydnaðist kortini ikki avbjóðaranum at koppa formanninum, hóast hann fekk 144 atkvøður.

Gunnleivur Dalsgarð fekk 188 atkvøður og heldur tí fram sum formaður næsta skeiðið.

## Kristianna Nesá 80 ár

Í morgin týsdagin 14. mars verður Kristianna Nesá 80 ár.

Kristianna er fødd í Króki á Toftum. Foreldrini vóru Inga Maria og Amaliel Højgaard. Hon er næst elst av seks systkjum. Eftir á lívi eru bara Kristianna og Dávur, sum býr í barnaheiminum.

Mamma og vinkonan Jenny fóru sum ungar til Havnar at halda hús hjá Sunnuvu og Poul Müller bónda. Har var mamma í tvey ár, til hon fór inn aftur á Toftir at arbeiða á skrivstovuni hjá D.P. Højgaard. Har arbeiddi hon til hon giftist við pápa



okkara Mads, sum var sonur Elsebeth og Tummas í Gerðinum.

Vit eru 10 systkin og tá pápi var á sjónum, var sjálvsagt nógv hjá mammu at síggja til sum heimagangandi húsmóðir. Mamma bleiv einkja bert 54 ára gomul, tá pápi doyði av sjúku í 1981.

Í dag eigur mamma 25 ommubørn og 16 langommubørn,og tað metir hon sum eitt stórt ríkidømi.

Góða mamma. Vit takka tær hjartaliga fyri tað trygga heim, sum tú og pápi góvu okkum. Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum, og má Harrin geva tær nógv góð ár afturat.

*Barndomstid hos far og mor.*
*Glem den ej når du blir stor.*
*Hvad du lærte i dit hjem,*
*vil dig føre sikkert frem.*

**Børnini, ommubørnini og langommubørnini**



Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum

Tórsavnar alfrøði:

## Konfirmantar í 1909



Konfirmantarnir 3. oktober 1909: Vit kenna bert 4 av teimum 9 dreingjunum, sum sita aftast f.v.: nr. 2) Hans Olaf Hansen (Havn), nr. 4) Hans Frederik Joensen »Lenvig« (Hestur), nr. 5) Niels Ferdinand Petersen »Niels á Botni« (Nólsoy) ella Christian Djurhuus (Havn), nr. 8) Poul Eli Hansen (Havn).

Av teimum 12 konfirmantunum í miðraðnum kenna vit bert teir tríggjar, teir eru f.v.: 1) Otto Meinhardt Bech (Havn), nr. 3) Maren Malene Hansen (Nólsoy) og nr. 11) Carl Johan Bech (Havn).

Av teimum 8 konfirmantunum í næstfremstu røð kenna vit bert tvær, tær eru f.v.: nr. 5) Cathrine Malene Nicolaisen (Nólsoy) og nr. 6) Susanne Malene Joensen (Nólsoy). Tær báðar genturnar fremst eru ókendar.

32 konfirmantar vórðu fermdir í Havnar kirkju tann 3. oktober 1909, 17 av teimum vóru dreingir og 15 vóru gentir. Á myndini síggjast 16 dreingir og 15 gentir.

Teir konfirmantarnir ið ikki eru navngivnir á myndini eru: Hans Nicolai Niclasen, Hans Pauli Nolsø, Guttorm Hans Egede Reinert Joensen, Cornelius Christian Frederik Reinert, Zacharias Hansen, Bjørn Sofus Bjarnason, Johan Henrik Fritz Udbøn, Marie Louise Margareth Egholm, Hanne Cathrine Rasmine Hansen, Hansine Jacobine Mouritsen, Andrea Vilhelmine Caroline Viglund, Nicoline Josefine Lambaa og Pouline Christine Dimonica Kærbo, hesi vóru øll úr Havn. Hini vóru: Thomas Sigvald Reinert (Norðradalur), Hans Sivert Colbjørnsen (Hestur), Hans Andreas Andreasen (Velbastaður), Marianna Thomasia Rasmussen (Koltur), Johanne Marie Juliane Joensen (Kaldbak), Jette Thomasia Sofie Ulrikka Jacobsen (Kaldbak) og Olga Josefine Jacobine Niclasen (Velbastaður), og so eru tað tvær gentur, sum ongan heimstað hava, tær eru Andrea Marie Augusta Reinert og Jane Marie Reinert.

Vit fara so inniliga at heita á lesararnar um at hjálpa okkum við at fáa røttu nøvnini á røttu persónarnar. Vinarliga ringið til Birgar Johannessen tel. 314647 ella 214647.



Forelskað?

Vís tað í Sosialinum